# handVERKARIN

4. ÁRSFJÓRÐINGUR 2010 | BLAÐ NR. 36 | HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# Gleðilig jól og eitt gott nýggjár

Nú 2010 er farið at halla vil eg níta høvið at ynskja limum okkara við familju eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi komandi ár. Samstundis ynski eg øllum okkara samstarvsfeløgum eini gleðilig jól og tøkk fyri gott samstarv í brátt farna ári.

## Skrivstovan

Gjørt verður vart við, at skrivstovan er stongd frá og við 23. desember. Opið verður aftur mánadagin 3. januar 2011 kl. 9.00.

***Eli Brimsvík, formaður***

## Innihald


| | |
|---|---|
| Jólaheilsan frá formanninum | 2 |
| Lønartalva nr. 62: 1. oktober 2010 | 3 |
| Fyrsti góðkendi smiðjumeistarin | 6 |
| Jákup Andrias fekk mangan dyggan løstin | 11 |
| Sigmund sama hug sum pápin | 15 |
| Stásilig høli til ymisk endamál | 19 |
| Barometrið | 20 |
| Tímaløn, frítíðarløn, gjøld v.m. | 26 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Stoffalág 60 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting:** Gramar Spf. | www.gramar.fo
**Prent:** Pf. Føroyaprent | www.foroyaprent.fo • Svanamerktur prentlutur 541 705
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl 9 til 15.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo

# LØNARTALVA Nr. 62: 1. oktober 2010

**Tímaløn handverkarar:**

Longri útbúgvingar kr 122,91
Styttri útbúgvingar Kr 117,94

**Yvirtíðarlønir**:

Fyrstu 4 tímarnar + 35% kr 165,93
Næstu 3 tímarnar + 60% kr 196,66
Fylgjandi tímar + 100% kr 245,82
Leygar-, sunnu- og halgidagar + 100% kr 245,82

1. mai er heilur frídagur. Flaggdagur, grundlógardagur,
1. nov., jólaaftan eru frídagar aftaná kl. 12.00 og arbeiði í mattíð + 100% kr 245,82

**Viðbøtur: + hesi % av handverkaralønini**

Amboðspeningur 0,83% Kr 1,02
Skitiarbeiðspeningur 0,41% Kr 0,50
Bergholsarbeiði 8,28% Kr 10,18
Dampketilsarbeiði 8,28% Kr 10,18
Olju-og lýsitangaarbeiði og arbeiði í smáum tangum 8,28% Kr 10,18
Skittfiska- og sildalastarbeiði 8,28% Kr 10,18

**Vanliga arbeiðsvikan er 40 tímar**

**Bakarar:**
Kl. 04-07 + kr 65 187,91
Kl. 04-07 vikuskifti + kr 100 222,91

**Servisufak:**
Leygardag kl. 08 - 14 + 35% 165,93
aftaná kl. 14 + 100% 245,82

**Skiftisarbeiði:**
1. bólkur 122,91
2. bólkur 6,63% 131,06
3. bólkur 9,11% 134,11

**Serarbeiðarar:** (við útbúgving) 114,84
**Serarbeiðarar:** (uttan útbúgving)
1. árið 109,99
2. árið 1,45% 111,58
3. árið 2,92% 113,20
4. árið 4,41% 114,84

**Starvstíðarviðbót**

Fyri 3 ára starvstíð 1,60%

**LÆRLINGALØNIR**

Um tíman um vikuna
1. árið 32% 39,33 1.573,20
2. árið 40% 49,16 1.966,40
3. árið 45% 55,31 2.212,40
4. árið 55% 67,60 2.704,00
5. árið 70% 86,04 3.441,60

Pensiónsgrunnur (lærlingar): 7,50%
Fyri yvirarbeiði verður øll læruárini goldið serarbeið.løn á 1. ári 109,99 + hesi %

Fyrstu 4 tímarnar + 35% 148,49
Næstu 3 tímarnar + 60% 175,98
Fylgjandi tímar + 100% 219,98

Leygardag:

Fyrstu 5 tímarnar + 35% 148,49
Fylgjandi tímar + 60% 175,98

Sunnu- og halgidagar: + 100% 219,98

Lærlingaviðbøtur fyri forskotna tíð

Bakaralærlingar

Allar dagar kl. 18.00 - 04.00 kr. 35,00
Sunnu- og halgidagar kl. 00.00 - 24.00 og frídagar kr. 25,00

Kokka- og tænaralærlingar

Gerandisdagar kl. 18.00 - 06.00 kr. 4,00
Leygar-, sunnu- og halgidagar kr. 5,50

Frisørlærlingar

Sunnudagar verða goldnir eins og yvirtíð hjá lærlingum

**ANNAÐ**

Gjøld sbrt. sáttmála:
VITAN (Eftirútbúgvingargr.) 2X10oyru/tím.
Pensiónsgrunnur 13,00%
Lógarásett gjøld
Samhaldsfasti 1,75%
ALS gjald frá 01.07.2004 1,00%
Barsilsskipan 0,62%
Frítíðarløn 12%

**Føroya Arbeiðsgevarafelag / Føroya Handverksmeistarafelag**

# Fyrsti góðkendi smiðjum




## Fyrsta smiðjan í Føroyum, ið fekk almenna góðkenning sum lærupláss var smiðjan hjá smiðjumeistaranum Sigmund Arge, ið hevði smiðju úti í Grind í Havn.

Tá Sigmund Arge fekk smiðju sína góðkenda sum lærupláss var tað fyrst og fremst fyri, at teir lærlingar, sum lærdu hjá honum, kundu fáa eitt sveinabræv, sum gav teimum møguleika at halda fram at útbúgva seg. Tað vil siga, at frá honum fingu teir sveinabræv, sum eisini var góðkent uttanlands.

Sigmund Arge var føddur í 1868 og andaðist í 1941.

### Pápin var góður smiður

Pápi Sigmund, Niels L. Arge (1823-1900), var argjamaður og tiltikin góður smiður; hann hevði í mong ár smiðju úti í Grind í Havn.

Niels hevði frá barnsbeini víst sera gott hegni, og sum ungur fekk hann hug at leita sær út um landoddarnar at læra.

Niels hevði ein vinmann, Petur Alberg Holm; sum ungur fór til Danmarkar at læra. Hetta hevur helst havt stóra ávirkan á Niels.

Í 1844 avtalaðu Niels og Petur Alberg at




fara saman við skipi til Danmarkar. Ætlanin hjá Niels var at finna sær eitt gott lærupláss í Keypmannahavn; so hann kundi útbúgva seg til jarnsmið. Tað er onki at ivast í, at hann hevur mett, at nógv nýtt kundi lærast í útlandinum, sum ikki kundi lærast í Føroyum.

### Nýtt umhvørvi í Kollafirði

Eitt annað, sum eigur at vera nevnt í hesum sambandi er, at Niels L. Arge var vaksin upp í einum framburðshugaðum umhvørvi. Foreldur hansara vóru partur av mentunarliga rákinum, sum tók seg upp í Kollafirði fyrst í 19. øld. Hetta umhvørvi varð nógv ávirkað av Sjóvarbóndunum, sum m.a. blástu nýtt lív í føroysku kvæðamentanina. Teir yrktu fleiri nýggj kvæði, sum fingu undirtøku um alt landi. Talan var um nýbrot, uttan fordømi í Føroyum. Hetta var eitt nýtt rák, sum fekk ómetaligan týdning fyri føroyingar.

Kvæðini, ið teir yrktu, eru enn millum best umtóktu kvæði okkara.

Tað er ikki ov nógv sagt, at Føroyingafelag, sum varð stovnað í 1889, var ein spíri av rákinum, sum tók seg upp í Kollafirði.

Í hesum føri gingu hond og ond saman.

Her kundi verið skoytt uppí, at Janus og Hans Andreas Djurhuus høvdu røtur í Kollafirði, og vóru kjølfestir í hesum sama mentunarlívi.



## Onki frælsi í landinum

Tá Niels L. Arge leitaði sær av landinum í 1844 var einahandil í Føroyum. Hesin varð ikki niðurlagdur fyrr enn í 1856; og lá sum ein køvandi hond yvir føroyska samfelagnum. Hetta gjørdi, at so at siga onki pláss var til nýhugsan í Føroyum.

Tá høvdu føroyingar lítið ella einki frælsi. Sum dømi kundu vit nevnt, at tey, sum høvdu hug at gera eina ferð av landinum máttu søkja um bæði eitt og annað, og sluppu ongan veg, fyrr enn tey kundu lúka øll krøv, ið myndugleikarnir settu. Hesi viðurskifti fekk Niels uppá pláss, og fór saman við einum vinmanni til Keypmannahavnar í 1844.

## Læruupláss og sveinaprógv

Í Keypmannahavn eydnaðist Niels at sleppa í læru hjá eini skipasmiðju. Har lærdi hann tátíðar nýggjastu tøkni. Og har gjørdi hann eisini sveinastykki; - ein kistulykil við skeggi.

Hann arbeiddi eisini eina tíð sum sveinur í Danmark. Tað sigst, at hann var við, tá fyrsta jarnbreytin varð løgd millum Keypmannahavn og Roskilde.

Tað er onki at ivast í, at hann lærdi nógv nýtt í Danmark, sum fekk stóran týdning fyri hann persónliga, men eisini fyri føroyskt handverk og føroyska samfelagið sum heild.

Heimkomin bygdi hann sær hús og smiðju á Argjum.

## Fyrsta smiðjan úti í Grind

Men smiðjan á Argjum hevur helst verið nakað lítil og ikki høglig at koma til. Tí hevur tað verið natúrligt at byggja eina smiðju nærhendis Havnini. Og tá Niels í 1877 fekk eitt øki úti í Grind at byggja smiðju á var farið til verka at byggja nýggja smiðju. Niels var fyrsti maður at byggja smiðju úti í Grind; seinni vóru fleiri aðrar bygdar í grannalagnum.

## Vaksandi smiðjuarbeiði

Men tað ganga ikki nógv ár, so er smiðjan hjá Niels ov lítil. Fleiri mans og eisini lærlingar vóru nú í arbeiði, og tí var tørvur á meira plássi at arbeiða á.

Á økinum har fyrsta smiðjan stóð var



trongt, og nærmasti granni vóru eini sethús, sum stóðu beint vestanfyri. Tí hevur ikki verið hildið ráðiligt at byggja uppí fyrstu smiðjuna. Niels fær tí loyvi at byggja eitt sindur longur úti við trøðna hjá Konrad Nicolajsen. Her byggir hann – eftir tátíðini eina rættuliga stóra smiðju. Men arbeiðið vaks í stórum og tí var neyðugt at byggja uppí bæði í 1890 og 1894.

Smiðurin hevði lærlingar og nógvir eru teir, sum hava lært handverkið hjá honum.

## Handverksumhvørvið úti í Grind

Nú var stórt virksemi úti í Grind, í mun til, hvat hevði verið nøkur fá ár frammanundan. At tørvur – eftir stuttari tíð – var á so mongum handverkarum hevði samband við, at føroyingar vóru farnir at dríva havfiskiskap og høvdu keypt eitt stórt tal av sluppum, sum áhaldandi kravdu ábøtur og viðlíkahald.

Ein partur av arbeiðinum var gjørt umborð á sluppunum og mangan var neyðugt at smíða jarnknø og jarnbond at styrkja tær við. Neyðugt var eisini at smíða boltar og spíkarar til teirra.

Smiðjuarbeiði var tungt arbeiði, og tí var tørvur á evnagóðum monnum.

Tørvur var eisini á at smíða fortoyningar og grundketur til skipini. Tær máttu vera sverar og sterkar; um hetta mundi vóru ongar havnir í Føroyum.

Men tað vóru ikki bara føroysk skip, sum høvdu tørv á dugnaligum handverkarum. Um hesa tíðina vóru bretar farnir at fiska við trolarum undir Føroyum. Hesi skip høvdu eisini brúka fyri umvælingum, tað kundi vera at væla um ketil, maskinu ella spæl.

## Maria og Niels L. Arge

Maria og Niels áttu 8 børn, sjey synir og eina dóttur; gentan doyði einans 5 ára gomul. Jákup Andrias var elstur. Hinir vóru Jóhan, Petur, Eliesar, Óli, Sofus og Sigmundur, sum var yngstur av brøðrunum.

Niels, sum nú eisini var nevndur "Gamli Smiður" tók navnaskifti frá Andreasen til Arge, og øll børn teirra fingu hetta eftirnavn.

Frá barnsbeini livdu synirnir í smiðju-umhvørvinum, og tí sigur tað seg mest sum sjálvt,



at fleiri teirra valdu sær handverksútbúgving, og arbeiddu sum smiðir – ikki bara í Havn, men víða um í landinum.

## Jákup Andrias Arge

Jákup Andrias var elstur av børnunum hjá Mariu og Niels.

Sum blaðungur lærdi hann jarnsmíð hjá pápanum. Men hann vildi læra meira, og 20 ára gamal fór hann til Ålborg har hann hevði ein pápabeiggja, sum fekk honum arbeiði hjá "De Schmidtske Jernstøberier".

Har var hann alt fyri eitt væl lýddur, og skjótt sóu teir, at hann longu tá var stak góður handverkari. Tí gjørdist hann eisini skjótt sveinur.

Tað, ið vakti hansara stóra áhuga í Danmark, vóru tey stóru havnarløgini í Ålborg, Århus og Keypmannahavn og teir stóru bygningarnir, ið bygdir vóru av innfluttum gróti úr Noregi og Svøríki.

Nú gjørdist hann fullvísur í, at góðir møgu-





leikar vóru fyri eini grótvinnu í Føroyum og útflutningi av føroyskum gróti.

Í Danmark hevði hann nomið sær kunnleika í jarnsmíði og byggilist og arbeiddi á báðum økjum tey fyrstu árini, eftir at hann var komin aftur til Føroya.

Seinni arbeiddi hann mest sum byggimeistari, og bygdi m.a. fyrst í 1880 turkihúsið hjá Restorff á Rundingi, og var við at byggja Amtmanshúsini. Hann gjørdi eisini Kongaminnið í 1882 og var formaður fyri grótlaðingini av fabrikkini hjá Østrøm, ið stóð liðug í 1886. Brúnna um Havnará gjørdi hann í 1885.

## Føroysk hús úr føroyskum gróti

Jákup Andrias vildi fegin prógva, at tað væl bar til at byggja góð vøkur hús úr føroyskum gróti. Hann valdi at vísa vegin við at byggja sær sjálvum eini slík sethús úti í Rættará í Havn. Húsini vóru reist í 1883, og eru tey fyrstu av sínum slag í Føroyum. Húsini eru laðað upp við rætthyrntum gróti við sementsamankoming.

Tað verður sagt, at Hannes Finsen, amtmaður, eggjaði Jákup Andriasi til. Tá húsini stóðu í ger var hann so at siga dagliga úti í Rættará, og hugdi, hvussu gekst. Tað tykist sum, at Hannes Finsen eisini hevur havt sín lut í, at Amtmanshúsini vórðu laðað av føroyskum gróti.

## Brøðurnir arbeiddu væl saman

Tá stórarbeiði vóru fyri arbeiddu brøðurnir væl saman, og stóðu fyri fleiri bygningsverkum, sum enn standa sum prýði og sonn listaverk.

Eitt tað besta dømi er Ráðhúsið í miðbýnum í Havn, sum upprunaliga varð bygt til kommunuskúla. Djóni í Geil teknaði bygningin. Jákup Andrias og brøður hansara átóku sær at standa fyri øllum grótarbeiðinum – tað fevndi



um at flyta hóskandi grót til byggiplássið, at høgga til ávísar støddir og laga upp í fulla hædd. Skúlin var vígdur 4. august 1895, og prógvaði tá, at føroyskt grót er gott byggitilfar og at slíkir bygningar eisini eru prýðiligir.

## Fleiri listaverk

Tá Sparikassin um ár 1900 skuldi byggja sær stór hús í miðbýnum í Havn vóru aftur boð eftir góðum smiðjum. Sparikassin ynskti, ein bygning, sum var meinlíkur kommunuskúlanum. Hetta arbeiði átók Jákup Andrias sær. Bygningurin varð reistur í 1905, og er enn sætt prýði í miðbýnum í høvuðsstaðnum.

Av øðrum bygningum, sum Jákup Andrias Arge stóð á odda fyri kunnu vit nevna Føroya Banka í 1906, Mullers Pakkhús við Vestaru vág í 1908 og Evensens Pakkhús og brúgv í 1913. Hetta eru bert nøkur dømi.

Tað var ikki bert í Havn, at fólk dugdu at síggja, at stórt virði er í vøkrum grótbygningum. Tí eru eisini aðrir bygningar – víða um í landinum – bygdir úr føroyskum byggitilfari – føroyskum gróti.

# Jákup Andrias fekk mangan dyggan løstin



Fáur maður man hava verið fyri so mongum óhappum og dyggum løstum sum Jákup Andrias Arge. Tað fór eitt stykki av honum nú og annað tá, og at enda var so lítið eftir av honum, at hann var ikki arbeiðsførur. Tað kom tí væl við, tá danska Vandbygningsvæsenet í 1919 setti hann í starv sum eftirlitsmann við havnabyggingum. Hann búði nú í Danmark til 1922. Tá sendu teir hann til Føroya at byggja grundina undir VBV-húsunum í Havn.

Hann hevði eftirlit við byggingini av havnunum í Havn og Skopun, umvælingini av Fiskieiðinum í Hvalba og vegnum í Sandslíð.

## Mangar arbeiðsvanlukkur

Tá ið teir sprongdu á Rundingi til Turkihúsið hjá Restorff, fekk Jákup Andrias sín fyrsta álvarsama løst. Ofta hendi tað, at fjúsið slóknaði, og tá vóru ongi onnur ráð enn at bora krútið upp úr aftur við einum klænri bori. Jákup Andrias gjørdi sjálvur tann vandafulla partin av øllum arbeiðum, og hann var næstan



komin á botn, tá skotið brast. Hann var so heppin, at alt skotið fór upp í vinstru hond. Lógvin var illa farin, lekifingur var burtur, og longutong hekk í eitt korter í trevsum niður úr hondini, og sjálvur helt hann hondini meðan longutong varð skorin av, og hondin seymað aftur.

Borurin fleyg upp í loft og sveið fram við andlitinum, men meiddi hann ikki.

Borurin var hálvatriðju alin langur. Hann varð funnin langt burtur, boygdur hornrætt. Hamarin fingu Kolllfirðingar í nót út fyri Gulakletti.


Glarmeistarin v/Poul Guttesen.



Søla og montering av lágorkutermorútum , u-virði níður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas til brúsu–og glasveggir.
www.glarmeistarin.fo

Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466



## Dreymur

Náttina fyri hevði hann droymt, at átta mans vóru inni í kamarinum og royndu at leggja hann í eina kistu, men hvørjaferð teir skuldu leggja lokið á, spenti hann føturnar uppundir. Seinastu ferð vaknaði hann við, at lokið reyk upp undir loftið. Hann sat tá alsveittur uppi undir sær. Konan vaknaði av brestinum frá honum og var ræðsluslígin, sum ikki er at undrast á.

## Høkan fór í trý

Meðan hann lagaði síni egnu hús í Rættará, hendi annað óhappið. Um náttina hevði hann droymt, at Hannes Finsen, amtmaður, var inni hjá honum, at fleiri sengur stóðu har, og at hann sjálvur at enda varð lagdur í eina song. Hendan dagin stóð hann saman við beiggjanum Peturi og Pedda við Stein uppi á einum byggipalli, og teir høvdu ein tungan stein uppiá. Sum teir standa og baksa við steinin, brotnar pallurin undan teimum.

## Stóran skaða í høvdið

Petur og Pedda sluppu óskaddir, verri var við Jákup Andriasi. Hann fekk stóran skaða í høvdið. Høkan var farin í trý, kjálkabeinið hekk niður frá oyranum, allar tennirnar loysnaðu og summar dotnar úr, stórt hol í nakkanum og fýra riv vóru brotnað. Tá ið vitið rann við hann aftur á sjúkrahúsinum, stóðu tvey fólk uppi yvir honum, annað var góði vinur hansara, Hannes Finsen, hitt ein kvinna við luktiglasi í hvørjari hond, sum hon helt honum fyri nasarnar.

## Urmakarin ger bandasju

Tá ið Effersøe, lækni, fór undir at seta saman aftur, sendi hann boð eftir Urmakaranum, ið var bróður Jákup Andreas, og segði við hann, at skuldi skaðin grøðast, mátti hann gera eina bandasju um høvdið á beiggjanum. Hetta læt hann sær ikki siga fleiri ferðir, og til næsta morgun varð arbeitt við at spjálka og leggja beinini saman. Endin var, at alt tyktist at sita, sum tað skuldi.

## Óarbeiðsførur í tríggjar mánaðir

Tá ið sundur aftur varð tikið, tveir mánaðir seinni, var ikki heilt væl vorðið, tí nú fekst munnurin ikki upp, tí liðirnir vóru stívnaðir. Tað gingu tríggir mánaðir frá tí óhappið hendi, til Jákup Andrias var arbeiðsførur aftur.

## Misti hálvan fótin

Meðan Sparikassin varð bygdur, gjørdist Jákup Andrias blindur í øðrum eyganum av einum splintri, ið sprakk undan einum setthamari. Hálvan fótin misti hann, tá ið hann bygdi Evensens Pakkhús. Náttina fyri hevði hann droymt, at sonurin Petur kom til hús rennvátur við hálvum fóti. Hann tók hetta sum eina ávaring og býtti tí um við Petur, so at hann sjálvur kom at standa við kranan. Ein stórur steinur glapp úr stroppinum. Hann stóð tá uttast á brúnni. Fyri ikki at fáa steinin oman yvir seg, tveitti hann seg eftir bakinum út á sjógv, men ikki var hann nóg skjótur, steinurin klipti annan fótin av. Petur leyp út eftir pápanum og bar hann út á sjúkrahúsið, har hann lá í tveir mánaðir, tað mesta av tíðini við nógvari pínu.



# Sigmund sama hug sum pápin



Sigmund hevur havt sama hug sum pápin "Gamli Smiðjur", men tá vóru eisini nógvar forðingar beindar burtur, t.d. var nú ongin einahandil. Vinnufrælsið var komið í staðin.

Sigmund fór ungur at sigla við einum føroyskum skipi, sum sigldi við vørum millum Føroyar og útheimin.

Hetta hevur ivaleyst givið honum blóð upp á tonnina, tí seinni flutti hann til Danmarkar, og fekk sær smiðjuútbúgving har. Hann arbeiddi eisini sum sveinur í fleiri ár í Danmark.

## Sigmund og Margreta

Tá mamma Sigmund doyði í 1892 sendi Gamli Smiðjur boð til Sigmund, ið tá arbeiddi sum smiðjur í Danmark, at koma heim. Honum stóð tá í boði at yvirtaka smiðjuna hjá pápanum. Afturkomin búsettist hann fyri fyrst á Argjum hjá pápanum. Tá tók hann sær eisini av smiðjuni hjá pápanum, sum legði frá sær.

Sigmund giftist í 1892 við Margretu Andreasen, vanliga nevnd Greta. Hon var dóttir ein kendan skraddara í Havn, Andreas Andreasen. Tveir brøður hennara gjørdust kendir skiparar í Føroyum, Napoleon Andreasen og Jens í Dali.

Greta hevði eisini leita sær eftir nýggjum avbjóðingum uttanlands. Hon búleikaðist í Danmark í fleiri ár; var m.a. á einum fólkahá-

skúla í Marienlyst. Her eigur at vera nevnt, at í hesum tíðarskeiði høvdu donsku háskúlarnir stóran týdning fyri føroyingar. Greta arbeiddi eisini eina tíð í Keypmannahavn m.a. hjá einari kendari sjónleikarakvinnu.

## Sigmund og brøðurnir

Áðrenn Sigmund fór av landinum hevur hann helst dugað mest sum alt vanligt føroyskt smiðjuarbeiði, sum tá var. Hann hevði arbeitt í smiðjuni hjá pápanum, saman við brøðrunum, í smiðjuni úti í Grind.

Í teirri smiðjuni vóru t.d. gjørdir knívar, hakar torvskerar, spakar, líggjar, jarnportur, ketur akker, boltar og fortoyningar.

Teir arbeiddu eisini umborð á skipum, sum komu á Havnina.

## Gróthugurin

Sigmund Arge var millum teirra, sum í 1929 tóku seg saman og stovnaðu P/F Grótvirkið. Hetta felagið fór undir royndir at fáa selt føroyskt basalt til Danmarkar. Hesir menn vóru ivaleysir í, at tað fór at bera til at skera føroyskt grót við maskinum, og at tað kundi gerast ein útflutningsvøra.

Felagið sendi í hesum sambandi Sigmund Arge til Danmarkar. Har skuldi hann royna at skapa áhuga fyri føroyskum gróti, og fáa í lag eitt samband, sum kundi skapa møguleikar fyri sølu til Danmarkar.

Hann skuldi eisini royna at fáa partapening til felagið.

Hetta gjørdist ikki nøkur løtt uppgáva.

Sigmund skrivaði dagbók. Í hana skrivaði hann eisini um ferðina til Danmarkar, og greiðir har frá ymiskum, sum hann upplivdi.

Í Keypmannahavn fekk hann samband við ein borgarstjóra, H.C. Møller, og ein mann, ið hann nevnir harra Rindom. Hesin skuldi hjálpa honum at fáa selt føroyskt grót uttanlands.

## Brot úr dagbók

Um Rindom skrivar Sigmund í dagbókini: "... synes at være meget interesseret i vor sag og udtalte, at hann skulde gøre alt hvad der stod i hans magt for at fremme sagen, og allerede da udtalte han, at han vilde udbetale os 50% av værdien op til 40.000,- kr. for hver sending, som kom til Danmark, og resten, naar det var solgt, hvilket maa siges at være et glimrende tilbud, imod at han fik en passende provision. Jeg kan saa tydeligt huske, hvor glad borgmesteren blev over for dette tilbud, og ikke mindre jeg.

Herr Rindom vilde have lov til at undersøge forholdene hos de forskellige, der havde savet den færøske basalt, hvad vi gav ham som en selvfølge lov til.

## Eitt vónbrot

Vi kom saa igen et par dage senere, som vi havde lovet; men det var og er dog den største skuffelse, jeg nogensinde har været ude for; vi fik nemlig det svar af Herrr Rindom, at han havde talt baade med den ene og den anden, og de sagde begge ens, at basalten lod sig ikke save bedre end granitten; det blev vi meget ilde berørt af, for det var tydeligt nok sammenlagt raad imod sagen, men borgmesteren trøstede mig med, at det var et godt tegn, for nu kunde man se, at de var bange for konkurrencen, for firmaerne havde store interesser baade paa Bornholm og i Sverige, og han sagde tilsidst, at han selv havde set, at basalten lod sig save."

## Nielsens Mekaniske Stensaveri

Í einum brævi, sum er váttað 26/4-1938 av N. Nielsens Mekaniske Stensaveri í Keypmannahavn verður greitt frá roundum við føroyskum gróti. Har er hetta at lesa:

I efteråret 1931 blev der i Havnestenbruddet i Tórshavn brudt en del blokke af den færøske basalt i vilkaarlig størrelse og farve, som



sendtes til København for at blive forarbejdet, idet leveringer, der var paa ca. 100 tons, skulde tjene som prøve for den færøske basalts andvendelse til bygningsbrug, udsavet i plader.

Disse prøveblokke er nu i sin helhed udsavet og har fundet andverndelse i forskellige nybygninger og ombygninger, hvoraf de væsentligeste skal nævnes:

Firmaet A. C. Bang, Østergade.

Varehuset Messen, Købmagergade.

Vagtselskabets Nybygninger, Akseltorv.

Handelsbanken, Hj. Af Nørrebrogade og Fællesvej.

A/S Schou og Co., Kapelvej.

C.B. Hansens Etablissement, St. Kongensgade.

B.T. Centralen, Raadhuspladsen.

Ved de her nævnte byggearbejder er den færøske basalt udelukkende anvendt i udsavede plader og har som saadan nu vist sin berettigede anvendelse som bygningenssten i denne bearbejdelse. Det færøske materriale er i ovennævnte bygninger kun anvedt til udvendig beklædning, saasom sokkel, omramning o.l. og har i løbet af disse faa aar bevidst at være egnet til udvendig beklædning. Ja, at det endog viser sig bedre egnet til dette brug end andre lignende udenlandske materialer.

## Stauning

Øll tríatiárini royndi Sigmund at fáa veruliga gongd á sølu av gróti til Danmarkar. Helst hevur stóra arbeiðsloysið í Føroyum í tríatiárunum eisini ávirkað.

Tá ið danski forsætisráðharrin, Stauning, var í Føroyum í 1936, vendi Sigmund sær eisini beinleiðis til hansara og greiddi honum skrivliga frá málinum.

Hann vísti á, hvønn týdning tað hevði havt, at føroyingar vóru farnir at byggja hús úr gróti í staðin fyri innfluttum viði og, hvussu neyðugt tað var at fáa gongd á ein føroyskan grótídnað.

## Sigmund og Lars Larsen

Sigmund Arge og Lars Larsen tóku í 1938/1939 stig til at saga føroyskt grót í fláir til útflutnings. Men tá annar heimsbardagi brast á slitnaði alt samband millum Føroyar og Danmark, og kom ikki í lag aftur fyrr enn kríggið var liðugt í 1945. Men í 1941 doyði Sigmund, og hann kom tí ikki at hava nakra ávirkan á tað, sum seinni hendi.



## Fyrsti góðkendi lærumeistarin

Sigmund var góður smiður og samvitskufullur meistari. Honum dámdi ikki, at menn, sum høvdu lært hjá honum skuldu noyðast at læra umaftur, tá ið teir fóru av landinum at læra til maskinmeistara.

Tí vildi hann hava sína smiðju góðkenda av danska statinum. Og tað eydnaðist honum eisini.

Smiðjan hjá Sigmundi var tann fyrsta í Føroyum, ið varð góðkend, sum lærupláss á jøvnum føti við smiðjur í Danmark.

## Smiður úti í Grind

Á leið har, sum Smiðjan í Lítluvík nú stendur, vóru fleiri smiðjur. Men tá nýggjur vegur varð gjørdur ímillum J.C. Svabosgøtu og Bøgøtu, í 1935, broyttist alt umhvørvið. Tá vóru m.a. smiðjur tiknar niður og dekk lagt yvir ánna, ið har rann.

Verkstaðið, sum Sigmund Arge bygdi, úti í Grind 1912, varð standandi, men tað var nógv broytt og umbygt til sethús.

## Stórverk úr gróti

Í seinnu helvt av 19. øld og fyrst í 20. øld vóru fleiri stór grótarbeiði gjørd í Havn. Mong teirra standa enn – mest sum óbroytt – og prýða høvuðsstaðin.

Niðan fyri eru nøkur nevnd:

Amtmanshúsið: 1880
Kongaminnið: 1882
Sethús hjá Jákup A. Arge við Rættará: 1883
Fabrikkin hjá Østrøm: 1886
Gamli Kommunuskúli, nú ráðhús: 1895
Sethús hjá Sigmund Arge í Dr. Jacobsensgøtu: 1902 (Nú sethús hjá Nemus Napolium Djurhuus)
Deildin hjá Eik Banka í Miðbýnum: 1905
Gamli Føroya Banki í Tórsgøtu: 1906
Müllers Pakkhús: 1908
Evensens Pakkhús: 1913

At enda kunnu vit nevna, at teir eisini gjørdu trappuna til høvuðsinngongina á Christiansborg.

# Stásilig hølir til ymisk endamál





1. Hølini kunnu útleigast til limir, eins og onnur uttanfyri felagið; talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

2. Farast skal væl um hølini, og skulu tey latast aftur í sama standi, sum tá ið tey vóru útleigað.

Møguligir skaðar á innbúgv og útbúnað undir útleigan, skal alt fyri eitt fráboðast felagnum, og fult endurgjald fyri umvæling/nýkeyp skal rindast felagnum.

3. Hølini verða leiga út til hesi endamál:

A. Vanlig tiltøk og fundir eftir vanliga arbeiðstíð.

B. Tiltøk, ið eru í vanligari arbeiðstíð og eftir vanliga arbeiðstíð.

C. Tiltøk ið fevna um meira enn ein dag.

D. Framsýningar, eftir nærri avtalu.

E. Merkisdagar (t.d. føðingardag/fermingardag)

F. Skeiðvirksemi.

4. **Prísir.**

Er talan ikki um limir er kostnaðurin við køki pr. kvøld 2.000,- kr.

Limir leiga hølini til Merkisdagar (inkl. nýtslu av køki) fyri 1.000,- kr.

.

Er talan um onnur tiltøk, sum t.d. fevna um fleiri dagar, verður nærri prísur avtalaður.



# BAROMETRIÐ: Sof



**Sofus Joensen**, húsavørður á Lágargarið, svarar:
**Aldur:** 54 ár
**Hjúnafelagi:** Turid Joensen, skrivstovukvinna

# us Joensen

**Børn:** Tveir dreingir; Abraham 22 ár, og Andrias 13 ár.

**Elektrikari:**
Eg lærdi til elektrikara á Tórshavnar Skipasmiðu. Har hevði eg tríggjar lærumeistarar. Tann fyrsti var Sten Hjul Petersen, næsti var Petur Í Króki og tann triði var ein vágamaður, sum æt Árni Joensen.

**Nær byrjaði tú at læra?** 1980
**Hvar gekk tú í Tekniskum skúla?** Í Tekniska skúla í Tórshavn.
**Hvussu nógvar vikur gekk tú í skúla?** 4x10 vikur
**Nær var tú útlærdur?**
1984

**Sveinastykki?**
Eitt máli-instrument

**Hvar hevur tú arbeitt sum sveinur?**
Eg byrjaði at arbeiða sum servisumaður hjá Thomas Dam í Havn, og var har í gott 2 ár. Haðan fór eg til Jákup á Dul, og var har í u.l. 4 ár, eisini sum servisumaður.
Í januar 1991 byrjaði eg sum húsavørður á Lágargarði, har eg eri enn.

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl?**
Var við at byggja M/S Ternuna sum lærlingur á Tórshavnar Skipasmiðjuni; tað var bæði lærurikt og áhugavert.

**Hvat heldur tú um Eftirlønarskipanina hjá Havnar Handverkarafelag?**
Sera góð.

**Hvat heldur tú um samlagstryggingina?**
Sera góð.

**Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá ein handverkara í dag?**
Útbúgvingin.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum?**
At alt gongur sum ætla, glaðir og nøgdir starvsfelagar.

**Hvat kann øsa teg?**
Tá fólk úttala seg um ting, ið tey ikki hava skil fyri.

**Frítíðarítriv?**
Handverkarafelagið, seyðahald og annað djórahald, eisini urtagarðsarbeiði og sangur.

**Besta bók?**
Bíblian

**Besti sangur?**
Tíðarhavið við Hanus G. Johansen.

**Besti filmur?**
Gladiators

**Besti sjónleikari?**
Rossel Crow

**Fartelefon?**
Nokia

**Telda?**
HP/Dell

**Bilur?**
Mazda

# Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo




BYGMA
BALSLEV




Tel 34 10 10 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo


AMBOÐ
TIL EITT OG HVØRT
ENDAMÁL
2X3
TIMBUR HT TILFAR HANDILIN
MULTI MASTER TOP
3198,00
DURASPIN DS275 AC
inkl. 12000 stk 39A35mp
2998,00
DEWALT KAP OG
GERINGSSAG DW718
8998,00
METABO AKKU BS 18V LI
2 x battarí (2,2ah lithium)
2498,00
BAHCO
BLACK&DECKER
metabo
LASER-PROF
SENCO
DEWALT




SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f. · Staravegur 17 · Postsmoga 3258
110 Tórshavn · Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar






## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo

# Tímaløn, frítíðarløn, gjøld v.m.

**Tímalønin er frá 1. oktober 2010:**
**kr. 122,91 (minstaløn)**

3-ára starvsaldur gevur 1,6% lønarhækkan.
Frítíðarløn: 12%
Konto: 6460 - 299.601.6

**Limagjald og Lívstrygging:**
Limagjald + lívstrygging er 450,- kr. pr. mán. Limirnir gjalda sjálvir limagjald um ikki onnur avtala er gjørd við arbeiðsgevaran.
Konto: 9181 - 133.013.8
Konto: 6460 - 162.935.4

**Eftirløn:**
Arbeiðsgevarin: 13%
Løntakarin: 2%
Tilsamans: 15%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9
Vágs Handverkarafelag:
Konto 6460 - 516.417.8

**Sjúkragrunnurin BATI**
Arbeiðsgevarin:
30 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Løntakarin:
15 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Sjúkragrunnurin BATI
Postboks 3227, 110 Tórshavn.
Tlf. 229578 – fax: 319178. Teldupostur: hdg@post.olivant.fo
Konto: 6460-4951044
Konto: 9181-4955791

**Lærlingar:**
Lærlingar gjalda kr. 10,- pr. viku í limagjaldi.
Konto: 6460 - 401.200.5

Lærlingalønir (% av sveinalønini)
1. árið: 32%
2. árið: 40%
3. árið: 45%
4. árið: 55%

Eftirløn til lærlingar: 7,5%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9

**Eftirútbúgvingargrunnurin VITAN**
Arbeiðsgevarin:
10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Løntakarin:
10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Vinnuhúsið
Postboks 1039, 110 Tórshavn.
tlf. 30 99 00 - fax: 30 99 01.
Teldupostur: mikkjal@industry.fo
Konto: 9181 - 495.879.0
Konto: 6460 - 101.278.0

# SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR


Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

## Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo



## Tú ert handverkarin!

... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín

Vit kunnu bjóða
- spennandi arbeiðsuppgávur
- ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
- starvsfólkamenning
- trivnað

Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv

SENDISTOVAN

LM ELECTRIC
Hoyviksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo

LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice

**Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20**

DYMO · Esselte · PILOT · uni-ball · LEITZ

# Skrivstovu-útgerð til dyrnar




## Útkoyring

**City er heildarveitari av skrivstovuútgerð til vinnulív og stovnar. Hugmyndin er, at alt til skrivstovuna fæst á einum stað. City hevur tríggjar deildir um landið, umframt nethandilin city.fo og útkoyringartænastu.**

Sum landsins størsti heildarveitari av skrivstovu-útgerð leggja vit dent á at bjóða tað besta og størsta vøruúrvalið. Flestallar vørur, ið tit hava tørv á dagliga, eiga vit á goymslu – og skuldu vit ikki átt tær, so bíleggja vit fegin.

Prísirnir á útkoyringartænastuni eru nú broyttir, soleiðis at tú altíð veitst, hvat kostnaðurin er.

Fyri vanliga útkoyring verður tikið eitt ómaksgjald á **kr. 80**.*

Fyri bíleggingar, ið eru størri enn kr. 3.000, verður **einki útkoyringargjald** tikið.*

** Bert galdandi fyri útkoyringarleiðina.*

### *Skjót útkoyring*

*Bílegg **innan kl. 11** og tú hevur vøruna sama dag**

city
www.city.fo

| Tórshavn | Klaksvík | Runavík | Bílegging |
|---|---|---|---|
| 347 300 | 347 310 | 347 320 | 347 340 |

# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*


sansir.fo

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*

**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29

**Húsavarðartænastan**

# Ídnaðar- og garaguhurðar

**Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92**

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn




**Battariir Til Øll Endamál**

**Fartelifonir**



**Hoyri Apparatir**

**Ur og mangt annað**



**Eisini hava vit øll vanlig battariir**





**Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prisir**

**PÓLAR**

Akkumulatorhandilin v/Margeir Brvaroddi
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 63 47 - fax 31 63 67 fartel. 21 28 60

**elmek**

v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · fax 217700 · elmek@post.olivant.fo

**Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl**





# KOM TIL EFTIRLIT VIÐ TÍNUM BÚSTAÐARLÁNI

Eik Banki P/F
Tel. 348 000
www.eik.fo

Hevur tú rætta bústaðarlánið? Við Realkreditt frá Eik fært tú eina bústaðarfígging, ið hóskar júst til tín

Avtala tíð til eftirlit á www.eik.fo og/ella á tlf. 348 000


UPP TIL
32%
Nýggj avsláttarskipan
Betur tú ert tryggjaður, størri avsláttur fært tú
trygging.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Betri pensjón